


Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi: -Leitivirksemið á føroyskum øki fer ikki at steðga upp, men tíðin setir krøv til okkum – vit eiga at raðfesta hetta økið politiskt, og tað haldi eg verður gjørt.

# Jarðfeingi: Oljuframtíðin sær bjørt út hóast turrar brunnar

Deil:

**Jan Müller**

10.12.2014 - 15:44

Oljan.fo

"Vit hava nýliga verið á stórari ráðstevnu í London m.a. fyri at taka pulsin á áhuganum fyri føroyska landgrunnninum, og har kundu vit staðfesta, at føroyska økið enn hevur áhuga millum oljufeløg," sigur stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen við Oljuportalin, stutt eftir, at boðað varð frá, at trý leitiloyvi eru latin innaftur.

Framvegis møguleikar

Nú um dagarnar varð sagt frá, at helvtin av leitiloyvunum á føroyska landgrunninum verður latin inn aftur. Vit hava tí spurt stjóran á Jarðfeingi, hvat hetta merkir fyri leitingina í Føroyum.

“Vit meta framvegis, at tað liggja møguleikar í økjunum, og vit fara eisini at taka hesi økini við í okkara marknaðarføring av landgrunninum. So tað, at verandi loyvishavarar lata øki aftur, merkir, at tað nú er gjørligt hjá øðrum at koma framat hesum økjunum. Kanningar eru gjørdar av økjunum, og tær kanningarnar verða atkomiligar hjá øðrum feløgum umvegis okkum um tvey ár. Tað merkir so, at tey fyri lítlan og ongan penga kunnu fáa gagn av tí arbeiði, sum longu er gjørt.”

-Hvussu kenst tað hjá Jarðfeingi, at Statoil, sum hevur gingið á odda í leitingini, nú bara hevur eitt loyvi eftir?

“Tað eru sjálvandi nógv feløg, sum hava givið týdningarmikil íkøst til leitingina. Tað skerst ikki burtur, at Statoil, sum jú hevur verið fyristøðufelag, hevur verið ógvuliga eyðsýnt og virkið í nógv ár. So vit vóna, at Føroyar nú ella seinni hóska inn í strategiina hjá Statoil, tí vit hava eitt sera gott samstarv við Statoil.”

-Er møguleiki fyri at hetta seinasta loyvið eisini verður latið inn aftur?

“Feløgini meta nú um úrslitini av boringini Súla Stelkur. Hvørt tey síggja møguleikar framhaldandi at hava loyvið, fer tíðin at vísa.”

-Hvat vilja tit gera fyri, at feløgini ikki rýma og lata hetta seinasta loyvið innaftur?

“Tað er altíð so, at tað kunnu vera ymiskar orsøkir til, at feløg halda fram við einum loyvi ella lata tað innaftur. Tann týdningarmesta orsøkin er, hvussu jarðfrøðiligu útlitini eru fyri at finna kolvetni, og um verandi loyvishavarar ikki meta ta fortreytina verða til staðar, so er ikki so nógv at gera við tað.”

Nýggj útbjóðing ein møguleiki

-Fara tit at royna at fáa feløgini at halda fram í hesum loyvinum?

“Sum sagt, so hevur tað stóran týdning, at leitivirksemið heldur fram, og um verandi loyvishavarar meta seg síggja nakað áhugavert og tí ynskja at arbeiða víðari við økinum, so viðgera vit tað sjálvandi jaliga.”

-Er møguleiki fyri, at tit fara at útskriva eitt nýtt leitiumfar, nú helvtin av loyvunum verður latin innaftur.

”Vit arbeiða við ymsum møguleikum. Eitt nýtt útbjóðingarumfar er ein av fleiri møguleikum, sum vit umhugsa.”

-Hvat halda tit um, at DONG nú er oddafelagið á landgrunninum?

“DONG er eitt felag við dugnaligum fólki, so tað virksemið, sum DONG stendur fyri, meta vit vera í góðum hondum. Og vit hava eitt gott samstarv við tey. Men vit arbeiða fyri at fáa fleiri feløg at arbeiða her. Tess fleiri feløg eru virkin, tess fleiri ymisk hugskot koma á borðið.

Framtíðin sær bjørt út

-Hvussu sær framtíðin út á landgrunninum - er vandi fyri, at oljuleitingin við Føroyar steðgar upp, og hvørja ávirkan hevur oljuprísurin á leitingina?

“Framtíðin sær bjørt út. Vit hava nýliga verið á stórari ráðstevnu í London m.a. fyri at taka pulsin á áhuganum fyri føroyska landgrunnninum, og har kundu vit staðfesta, at føroyska økið enn hevur áhuga millum oljufeløg. Hetta er partvíst knýtt at tí arbeiði Jarðfeingi hevur gjørt, eisini undan boringunum í summar, við at halda fokus á aðrar leitimyndlar og onnur øki enn teir myndlar Statoil hevur fokuserað uppá í teirra loyvum. Okkara leitimyndlar eru ikki ávirkaðir av úrslitunum, og er tað ein orsøk til, at áhugin ikki tykist verða serliga merktur av boringunum í summar.

Við tí lutfalsliga lága virkseminum, vit nú hava, mugu vit staðfesta, at tað liggur ein avbjóðing í at fáa virksemisstigið uppaftur. Fallandi oljuprísurin og stóra fokusið í oljufeløgum at fáa útreiðslustigið niður, hevur væntandi við sær, at eitt øki sum okkara ikki stendur ovast á leitilistanum hjá nógvum feløgum uppá stutt sikt, tí tað er ein sannroynd, at tað er ikki bíligt at arbeiða á okkara leiðum. Men við tíðini vænti eg, at oljuprísurin hækkar aftur, og um tað tá hevur eydnast oljuvinnuni at lækka útreiðslustøðið, so er tað bara ein fyrimunur fyri okkum. So, hóast stóra fokusið á at lækka útreiðslustøðið, kanska rakar nú, so vænti eg, at tað kemur til góðar seinni.

Ein annar faktorur, sum fer at gera seg galdandi og virka til okkara fyrimuns er, at leitiøkini runt í heiminum fækka, meðan tørvurin á orku bara økist, so tað fer at vera meira neyðugt at troyta óroyndar leiðir.

Leitivirksemið á føroyskum øki fer tí ikki at steðga upp, men tað setir krøv til okkum – vit eiga at raðfesta hetta økið politiskt, og tað haldi eg verður gjørt - tí onki kemur av sær sjálvum, og oljuvirksemið hevur higartil onki kostað landskassanum, tvørturímóti. Tað hevur kastað væl av peningi av sær til landskassan, og hevur verið við til at seta nógv vinnuligt virksemi í gongd, sum í dag er ein týdningarmikil súla í føroyska búskapinum.”